# ÁÐRENN TÚ BÍLEGGUR

## TAK RØTT MÁT

Er okkurt, sum skal skiftast, er umráðandi, at røtt mát verða tikin, og at upplýsingarnar ikki kunnu misskiljast. Breiddar- og hæddarmát mugu altíð vera uttan á karmi.

Karmmát er longsta mát á karmi.

Holmát er støddin á holinum í vegginum, har vindeyga ella hurð skal í. Hetta er vanliga í heilum tølum. Vindeyga er vanliga 12 mm minni enn holmátini. Til dømis, um eitt holmát er 1000 x 1200 mm, gevur tað eitt karmmát, sum er 988 x 1188 mm.

Gevið gætur at øll mátini verða givin í breidd x hædd.

## HURÐAR OG VINDEYGU GANGA

Upplýsingar um viðurskifti, ið gera tað neyðugt at skilja ímillum ´høgra´ og ´vinstra´, mugu avlesast frá tí síðuni har hongslini sita. Gongur vindeyga ella hurðin út, skulu upplýsingarnir avlesast uttanífrá. Stilla teg uttanfyri og ger eina einfalda tekning. Gongur vindeyga ella hurðin inn, skulu upplýsingarnir avlesast innanífrá.




## ORÐAFRÁGREIÐINGAR




**KARMUR:**
Tann parturin av vindeyganum, sum ikki kann latast upp.

**RAMMA:**
Tann parturin av vindeyganum, sum kann latast upp.

**SPROSSAR:**
Uppbýting av rútinum í rammuni. Gjøgnumgangandi ella klipssprossar.

**POSTAR:**
Uppbýting av karminum – skilja fasta partin frá rammuni ella skilja tvær rammur.

## SERLIG GLØS

Ljóðdoyvandi glas brýtur og doyvir ljóðbylgjur, tí glastjúgdin er ymisk á tí innara og tí ytra glasinum. Henda loysnin hóskar væl m.a. um tú býrt tætt við veg við tungari ferðslu ella nær við annað óljóð.

Trygdarglas hevur somu brotstyrki sum "vanligt" glas, men hongur saman í límingini, so tú ikki skert teg av tí - júst sum í bilrútum. Trygdarglas kann eisini vera herda glas. Herda glas hevur eina høga brotstyrki. Hesar loysnir hóska væl til vindeygu og hurðar, t.d. har rúturin fer heilt niður á gólv ella har tað er ábært móti illveðri.

Sóltálmandi glas er glas, sum antin sendir sólstrálurnar frá sær ella tekur tær í seg. Hetta fast í ymiskum stigum og styrkjum. Har sólin stendur á kann tað lættliga gerast bæði ov heitt og ov ljóst inni, bæði fyri fólk og innbúgv.

Ymisk rágløs verða vanliga nýtt har tað ikki skal síggjast inn, men ljós kortini skal sleppa inn, t.d. í vesivindeygum. Vit hava ymisk sløg av rágløsum, sum verða sett í okkara vanligu termovindeygu og hurðar. Sí dømir niðanfyri.


Oceanic 528


Abstrakt


Kura


Spegltráglas


Mattráglas


Pelz


Etza

GRANT

Tel. 355 000 · grant@grant.fo · í Geilini 2 · 385 Vatnsoyrar · Føroyar

# SNIÐ – nøkur dømir

grant.fo




estra VASTI